# Framleiðslan av VW Lupo 3L er steðgað







*Framleiðslan av heiðurskrýnda umhvørvisvinarliga bilinum VW Lupo 3L, sum koyrir 100 kilometrar upp á 3 litrar av brennievni er nú steðgað*

**Volkswagen skrivaðu søgu, tá teir fyrstu ferð komu á marknaðin við VW Lupo 3L, sum einans nýtti 3 litrar av brennievni til at koyra 100 kilometrar. Vegna sparingar hjá VW-konserni nini er framleiðslan av bilinum nú steðgað**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Millum ár og dag koma nógvir nýggir bilar á marknaðin, og sum oftast fáa hesir ein avloysara, tá nøkur ár eru gingin. Tað er meira sjáldan at bilmodell verða tikin av skránni, men í juni 2005steðgaði framleiðslan av tí heiðurskrýnda VW Lupo 3L, ið var tann fyrsti bilurin, sum einans nýtti 3 litrar av brennievni til at koyra 100 kilometrar. Bilurin hevur fingið nógvar nógvar heiðurslønir, síðan hann kom á marknaðin.

Ofta er framleiðslan av slíkum bilum lutfalsliga dýr, men eitt nú danska stjórnin lækkaði avgjøldini upp á bilum, tí hann var so orkusparandi og umhvørvisvinarligur. Av hesi orsøk hevur bilurin nógv seldur í Danmark, til fólk sum hava langan veg til arbeiðis. Í Danmark hava teir eisini sín egna felagsskap "Lupo 3L Klub Danmark", har 3L eigarar t.d. luta sínar royndi við bilinum á teirra egnu heimasíðu og skipa fyri "treffum" kring landið.

VW Lupo 3L hevur ein 1,2 litur TDI turbodiesel motor við 61 hk. Hetta er sami bilur sum Erling Simonsen í Havn fekk bygdan um til at koyra upp á rapsolju.

Hóast sølan av bilinum var góð í Danmark, hevur ikki gingið eins væl nógva aðrastaðni, har bilurin ikki hevur fingið somu sømdir. Við tíðini gjørdist framleiðslan ikki lønandi, og avgerð bleiv tí tikin um at gevast.



*Eftir fimm árum á marknaðinum verður sportsbilurin Opel Speedster ikki gjørdur meira*

## Opel Speedster tikin av skránni

**Eftir fimm árum á marknaðinum verður sportsbilurin Opel Speedster ikki gjørdur meira. Framleiðslan av Speedster byrjaði í september 2000, og bilurin var gjørdur í samstarvi við Lotus í Onglandi**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

21. juli 2005 koyrdi tann seinasti Opel Speedster av samlibandinum hjá Opel eftir fimm árum á marknaðinum. Framleiðslan av Speedster byrjaði í september 2000, og 7.000 bilar eru framleiddir síðan tá.

Hóast Speedster er týskur, er hann sami bilur sum enski Lotus Elise - men við størri karossaríi. Bilurin er eitt úrslit av samstarvi millum International Technical Development Center (ITDC) í Rüsselheim í Týsklandi og Lotus Engineering í Hethel í Onglandi.

Í 2003 varð Speedster kosin "Performance Car of The Year" av enska bilblaðnum "Car" í kapping við 38 aðrar sportsvognar. Í Onglandi eitur bilurin Vauxhall Speedster.

Eingin slíkur bilur er í Føroyum, men einaferð var ein Speedster her í sum framsýningarbilur hjá P/F Meinhardt Arge.







**MAZDA E2200 9-PERSÓNA BUSSUR TIL SØLU**
Árg. 1998. km. 70.500. Bussurin, sum verður seldur vegna flyting, er í góðum standi, rustviðgjørdur og nýsýnaður.
**Tel. 252804**